# Mars liggur við dýrari last í Las Palmas

**Trolarin, Mars, sum í sínari tíð var heimahoyrandi í Sandavági og síðan í Hósvík, liggur sum vit hava skilt í Las Palmas á Grand Kanariu við dýrastu last, sum skipið nakrantíð hevur havt – 11 ballur við marihuana, sum hava eitt søluviði av 2,5 miljardum krónum!**

SØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Manga lastina hevur ísfiskatrolarin, Mars, sum í fleiri ár var heimahoyrandi í Sandavági, ført til lands. Skipið er ikki longur heimahoyrandi í Sandavági, heldur ikki í Hósvík, haðani skipið varð selt úr Sandavági.



*Fyrrverandi føroyski ísfiskatrolarin, Mars, liggur í Las Palmas við 11 ballum av marihuana, sum hava eitt søluvirði av 2,5 miljardum krónum*

*Mynd: Skipalistin*

Helst er Mars í dag skrásettur í Panama.

Tá ið skipið fór úr Føroyum, ljóðaði, at keypararnir skuldu brúka tað til hummaraveiði.

Men sambært sponsku løgregluni hevur skipið verið meira enn á hummaraveiði, síðan tað fór úr Føroyum.

**2,5 miljardir krónur**

Vit hava skilt, at Mars í dag liggur í Las Palmas á Grand Kanariu við eini rættiliga dýrari last av marihuana.

Sum skilst, hevur danska TV-ávísin borið tíðindini um, at skipið er tikið í sponskum sjógvi – við ikki færri enn 11 ballum av mariuhuana, sum hava eitt søluvirði av umleið 2,5 miljardum krónum.

Eingin ivi er um, at hetta er nógv tann dýrasta lastin, sum Mars nakrantíð hevur ført. Men samstundis er lastin eisini ólóglig so tað brakar eftir í.

Vit hava skilt, at skipið er komið úr Suðurameriku við hesum metdýra "fongi", sum sponsku myndugleikarnir tíbetur avdúkaðu.

Fólk, sum hava sæð myndir av skipinum í TV-ávísini, siga, at gamla navnið framvegis er á skipinum, eins og heimstaður og kennibókstavirnir, VA 174.

# Konsertir og workshop fyri harmonikuspælarar

**Ì samband við vitjanina hjá russiska harmonikuleikaranum, Oxanu Lisowaja, hava føroyskir harmonikuleikarar høvi atverða við til ókeypis workshop í Læraraskúlahøllini leygardagin, 23. sept.**

WORKSHOP
*Beinta K. Jacobsen*
*starvsnæmingur*

Umframt konsertinar, sum verða við russiska harmonikusnillinginum, Oxanu Lisowaja – ávikavist í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og í Norðurlandahúsinum í Havn, verður eisini workshop við føroyskum harmonikuleikarum.

Tiltakið í Læraraskúlahøllini, sum verður í morgin - leygardagin, 23. september millum klokka 14 og 17, er ókeypis, og umframt harmonkuleikararnar, sum verða við, eru fólk eisini vælkomin at lýða á.

Ì Læraraskúlahøllini fer Oxana Lisowaja fyrst at hava eina lítla konsert. Síðan verður høvi at fáa sær kaffi, og tá verða eisini stundir til at práta við harmonikusnillingin, sum verður til reiðar at vegleiða og svara spurningum.

Umráðandi er, at tey, sum luttaka í workshop-tiltakinum, hava ljóðførini við sær.

Tað er Konsertfelagið og Norðurlandahúsið, sum standa aftanfyri russisku vitjanina í Føroyum.

– Vit vænta, at løtan í Læraraskúlahøllini verður hugnalig og ógloymandi – bæði fyri luttakararnar og tey, sum bara koma at lýða á, siga tey í Konsertfelagnum.

Ì kvøld klokkan 19:30 fer Oxana at hava konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og sunnudagin klokkan 16 fer hon at hava konsert í Norðurlandahúsinum.

Hósdagin spældi hon í Miðlahúsinum fyri starvsfólkum á Sosialinum, og einki er at taka seg aftur í, at Oxana Lisowaja er ein úrmælingur við síni konserthamoniku.



*Oxana Lisowaja spældi í Miðlahúsinum hósdagin. Í kvøld spælir hon í Mentanarhúsinum og sunnudagin í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Í morgin verður workshop í Læraraskúlahøllini fyri føroyskum harmonikuspælarum, og Konsertfelagið væntar, at hetta verður ein hugnalig og ógloymandi løta*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Næmingar í starvsvenjing

STARVSNÆMINGAR
*Petur Meinhard Magnussen*

**Navn:** Chrisian á Lava.
**Aldur:** 16.
**Flokkur:** 10. B. Runavíkar skúli.
*Hví valdi tú Bónus?*
– Eg vildi vita, hvussu spennandi handilslivið er.
*Er hetta nakað, tú ætlar at gera í framtíðini?*
– Ja, hetta kundi verið stuttligt og spennandi at gjørt í framtíðini.
*Lýs trý góð ting:*
– Arbeiðsfólkið,man lærir nógv, og tað er nógv at gera.



**Navn:** Búi í Hjøllum.
**Aldur:** 16.
**Flokkur:** 10. Tofta skúli.
*Hví valdi tú Bónus?*
– Her arbeiða bara konufólk, og tí eg vildi royna okkurt annað enn sjólívið.
**Er hetta nakað tú ætlar at gera í framtíðini?**
– Ja, eg elski at sita við kassan.
*Lýs trý góð ting:*
– Kassin, pausirnar og arbeiðsfólkið.

**Navn:** Dánjal Olsen.
**Aldur:** 16.
**Flokkur:** 10. A. Runavíkar skúli.
*Hví valdi tú Elding?*
– Haldi, tað er spennandi at royna okkurt nýtt.
*Er hetta nakað, tú ætlar at gera í framtíðini?*
– Eg veit ikki, tað kann verða, at eg fari at arbeiða í Elding.
*Lýs trý góð ting:*
– Arbeiðsfólkið, nógvar pausir, og FK er beint niðri undir.



**Navn:** Danny Kechtan.
**Aldur:** 16.
**Flokkur:** 10. B. Runavíkar skúli.
*Hví valdi tú Elding?*
– Tí, eg haldi tað vera spennandi at arbeiða við onkrum innan tøkni og sølu.
*Er hetta nakað, tú ætlar at gera í framtíðini?*
– Nei, hetta er ikki eg. Stutt sagt.
**Lýs trý góð ting:**
– X-boxin, arbeiðsfólkið og pausirnar í lagrinum.